danska Bureau Veritas, og seta fram krav um endurgjald frá teimum, sum hava sagt gott fyri skipinum, og hervið ført okkum bak ljósið.

- Tað sigi eg einamest av tí, at klassin í Føroyum hevur sett øðrvísi og størri krøv enn umboðini fyri klassan, sum vóru í Fraklandi og kannaðu skipið.

- Hertil er at siga, at klassingin er altjóða standard reglur fyri skip, men krøvini til skip í Føroyum, Onglandi, Týskalandi og Fraklandi ella Danmark, eru tær somu, sigur Bjørn á Heygum.

Seljast sum gamalt jarn

Hvørjar avleiðingar fær málið fyri tingið?

- Vit mugu royna at halda landskassan skaðaleysan. Um skipið ikki verður tikið í nýtslu, noyðast vit at krevja endurgjald frá seljara og klassanum.

- Um teir sakkønu nú meta, at tað ikki loysir seg at umvæla skipið, so er bert at selja tað sum gamalt jarn, og so hava vit einki skip.

- Fara tit at krevja, at nýtt skip verður bygt?

- Um so er, at Nolsoyar Páll ikki verður umvældur, so mugu vit taka støðu til, um nýtt skip skal byggjast, annað gamalt skip útvegast ella um vit einki skip yvirhøvur skulu hava, sigur Bjørn á Heygum.

Hann ásannar, at peningurin er brúktur, og at nýggj játtan umleið 50 mió. krónur um neyðugt skulu játtast til nýtt skip.

Ein sorgarleikur

- Hvussu kennist tað at hava nýtt 12 mió. almennar krónur til fánýtis?

- Tað er bæði spell og ein sorgarleikur. Vit hava játtað pening undir skeivum fortreytum, og mugu bert ásanna, at arbeiðið ikki er gjørt til lítar.

-Um t.d. fólk frá Skipasmiðjunum í Havn og á Skála høvdu verið við í Fraklandi og kanna skipið, so høvdu teir varnast skeivleikarnar, og so hevði hetta ikki hent, sigur Bjørn á Heygum.

Skipafelagsstjóri í Oljuráðleggingarnevnd

Árni Joensen avloysir Arna Poulsen í Oljuráðleggingarnevnd sum umboð fyri vinnulívið

JAN MULLER

Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum Føroyar, er nýggjur limur í Oljuráðleggingarnevndini.

Hann tekur við eftir Arna Poulsen, sum ikki hevur ynskt at sita í nevndini, nú hann hevur fingið nýtt starv. Arne Poulsen, sum var skrivari í Føroya Arbeiðsgevarafelag, er vorðin vinnumálastjóri.

Árni Joensen umboðar saman við Magna Arge, stjóra í Atlantsflog, føroyskt vinnulív í Oljuráðleggingarnevndini.

Oljuráðleggingarnevndin hevur fund í Havn hesa vikuna. Nevndin arbeiðir við einum tilmæli til landsstýrið um alt oljumálið.

Herí er m.a. uppskot til eina kolvetnislóggávu og uppskot til skattalóggávu og lisenstreytir í sambandi við eina komandi leiting á føroyska landgrunninum.

Rætting til tekst undir tekning

Av misgáum kom eitt orð skeivt undir tekningini hjá Óla P týsdagin. Tað var orðið „keypt" sum skuldi vera „vunnið". Rætti teksturin er tí hesin:

„Nú skal kannast um danir hava vunnið meira uppá okkum - í samband við Nato, enn vit upp á danir - í heilatíkið!"

Stórur áhugi fyri oljuráðstevnuni

JAN MULLER

Tað er stórur áhugi fyri oljuráðstevnuni, sum verður í Norðurlandahúsinum 5. og 6. mars.

Ráðstevnan er ikki almenn, men fyri limirnar í Føroya Oljuídnaði og annars umboðum fyri myndugleikar, stovnar, løgting og landsstýri o.l.

Plássið er avmarkað, og tí ræður um at tekna seg í góðari tíð.

Á skrivstovuni hjá Føroya Oljuídnaði, sum stendur fyri tiltakinum, verður sagt, at í gjár høvdu umleið 150 fólk teknað seg til ráðstevnuna. Freistin at tekna seg er 20. februar, so fyrireikararnir rokna við, at limir o.o. fara at senda tekningarlistan inn komandi dagarnar.

Orsøkin til at tekningarfreistin er longu fríggjadagin er tann, at tað skulu stórar fyrireikingar gerast í sambandi við ráðstevnuna.

Roknað verður við fullum Norðurlandahúsi til ráðstevnuna, sum er tann fyrsta av sínum slag í Føroyum.

Evnið, sum fer at verða umrøtt á ráðstevnuni, er møguleikarnir hjá vinnulívinum at vera við í eini oljuvinnu.

Prógv

17. februar fekk Lív Skoubo prógv sum sjúkrasystir á Vejle Amt Sygeplejeskole.

tíðindablaðið
SOSIALURIN
BOX 76 · 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið

Ja!

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum – og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

- ☐ Haldarar í Føroyum: 235,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: 425,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: (5 bl. í senn): 340.-/ársfj.
- ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir

Til ber altíð at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum

Navn:
Bústaður:
Postnr., bygd/býur:
Tlf.: Undirskrift:

Lesarabrøv

Sandoyingar! Standið saman!

Kommunuskuldin - kommunusamanlegging

Sandoyggin verður eins væl umboðað frá politiskari síðu sum hinar oyggjarnar. At geva politikarum ábyrgdina, at viðurskiftini eru so vánalig, er ikki heilt beint. Tað er altíð lættasti vegur, at ábyrgdin verður kastað yvir á borðið hjá politikarunum, men neyðugt er at síggja málið út frá øllum sjónarmiðum og eisini, hvussu sandoyingar á skilabestan hátt kunnu sleppa úr kreppuni, so tað aftur gerst livilig og at gongd kemur aftur í vinnulívið í Sandoynni.

Ein av høvuðstrupulleikunum í Sandoynni er kommunuskuldin. Hinar kommunurnar í Sandoynni vilja ikki hoyra talan um at leggja saman við Sands kommunu, tí skuldin hjá kommununi er rættiliga stór, og skattaloftið er eisini alt ov høgt samanborið við hinar kommunurnar.

Eg sá í sjónvarpinum upp undir kommunuvalið, har bygdarráðsformaður í Sandoynni úttalaði seg um, tá hann als ikki vildi hoyra talan um, at hansara kommuna fer at leggja saman við Sands kommunu. Og her er eitt talandi dømi um ósemju um kommunusamanlegging, og møguliga ein av trupulleikunum, sum hevur darvað upplatingina av ellisheiminum í Sandoynni. Illanstíð hevur verið nóg mikið við einum ellisheimi og einum flakavirki í Sandoynni, men tá ósemja er ímillum kommunurnar, so verður tað eisini harettir. Hóast Sands kommuna er illa fyri fíggjarliga, so er tað ein spurningur, um kommunan er før fyri at bera kostnaðin av einum ellisheimi á Sandi, tá lánibyrðan er tyngjandi fyri kommuna.

Kommunueftirlitið er í dag rættiliga strangt, tí fáa kommunurnar sum heild ikki tikið tey neyðugu lán, sum tær annars fingu í áttatiárunum, og harvið gerst trupult hjá t.d. Sands kommunu at útvega fleiri arbeiðspláss, tá skuldin hjá kommununi er so tyngjandi.

Men lán skulu so gjaldast aftur.

Vísið ábyrgd

Mær renna til þugs orðini hjá einum sera klókum politikara og fyrrverandi løgmanni, nevniliga Atla Dam, sum einaferð í einum lesarabrævi málbar seg um, hvussu neyðugt tað er at vísa ábyrgd. Og hetta er tað sum Sandoyggin og sandoyingar sannilga hava fyri neyðini - ikki at kasta ábyrgdina á bankarnar ella politikraarnar ella á aðrar hendur, men at sandoyingar sjálvir taka lógvatak saman til at loysa síni innanhýsismál, sum liggja fyri stavn. Politikararnir eru til at lóggeva og koma við ráðum, men teir hava einki til at leggja seg út í vinnulívið í Sandoynni ella í Skopun ella hinum oyggjunum.

Tí eiga sandoyingar sjálvir at standa saman eins og Sverri kongur á sinni. Bara tvey orð sum at vísa ábyrgd hava alstóran týdning fyri at fáa sjálvsvirðingina aftur og at skapa gongd og trivnað aftur í føroyskt vinnulív. Tú vinnur einki við at sita hendur í favn og bíða eftir, at politikararnir nú fara at skapa gongd aftur í vinnulívið - í dag ella í morgin - í Sandoynni.

Tað skilabesta hevði verið, at kommunurnar leggja saman og ráðføra seg við politisku myndugleikarnar. At skapa trivnað og arbeiði í Sandoynni kunnu bara sandoyingar sjálvir gera, um teir standa saman og vísa ábyrgd. Tí um ikki sandoyingar sjálvir taka ábyrgdina í egnar hendur, hvør skal so gera tað!

Skattgjaldari